


[www.oljan.fo](www.oljan.fo)

**Jan Müller** 01 - 04 - 2013

# Føroyskir tyrluskiparar hitta føroyskar yvirmenn í Persaraflógva

Tað verður oftani tikið til, at føroyingar eru at finna alla staðni i heiminum. Og so er. Tað var ein heilt serstøk løta umborð á donskum oljuskipi í Persaraflógvanum herfyri eisini eitt gott dømi um. Tyrlan, sum lendi á Maersk skipinum, hevði føroyska manning, Óla Reynskor og Fróða Waag. Tá teir lendu á Maersk skipinum FSO-AFRICA, fingu teir ikki sørt av einum kvøkki, tí á tyrlupallinum vóru tvey kend andlit og tóku ímóti, nevniliga landsmenninir James við Brúgv og Hans Fonsdal Kass, sum arbeiða sum yvirmenn í danska flotanum. Hans er Senior Terminal Supervisor og James, sum hevði sama heiti fyrr, er nú umborð sum konsulentur. Sum oljan.fo skilur, gongur tað skjótt fyri seg, tá tyrlurnar eru til arbeiðis í Persaraflógvanum, tí her er so nógv virksemi. Og so var eisini hesa ferðina. Teir fingu ikki sløkt tyrluna, tá myndin varð tikin, og tí er uppstillingin so sum so. Meðan fólk var fingið úr og í, og viðførið somuleiðis, náddu teir at taka eina skjóta mynd. Eftir ein steðg í tríggjar minuttir vóru teir báðir føroysku tyrluskipararnir á veg til næsta pall, og føroysku yvirmenninir vóru aftur til arbeiðis á brúnni. At føroyingar manna oljuskip úti kring heim er einki nýtt. Tað hava teir gjørt í mong mong ár. Men at teir eisini eru farnir at manna oljutyrlur í heimsins mest virkna oljuøki, Persaraflógvanum, hoyrir til nútíðina. Í fjør fingu tríggir føroyskir tyrluskiparar sáttmálar við fyritøku í Quatar fyri trý ár. Familjur teirra eru eisini fluttar til Doha í Quatar. Oljan.fo fer í næstum at hava samrøður við teir.